Ingilín Didriksen Strøm **nr. 39/2020**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi plastdálking, settur landsstýrismanninum við umhvørvismálum Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera reglur fyri at basa plastdálking frá grótspreingingum?
2. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrismaðurin fyri at basa plastdálking á landi og sjógvi í Føroyum næstu árini?

Viðmerkingar
Plastdálking er ein stórur trupulleiki í heiminum í dag. Mett verður, at í 2050 verður meir av plasti enn av fiski í heimsins høvum, um hildið verður á fram á sama hátt. Í dag verður bert 5 % av plasti endurnýtt, 40 % verður tyrvt ella brent, og restin endar her og har - í náttúruni á landi og sjógvi.[1]

Í Føroyum dálka vit eisini. Stutt síðan vóru biofiltur frá alivinnuni funnin í hópatali í náttúruni; vit vita, at spreingileidningar reka til havs og dálka aðrastaðni í náttúruni, at vrakað graslíki liggur og rekst, og at plastpetti av plast-ballaðum hoyggi slítast av og enda í haga og fjøru. Eingin lóg verjir náttúruna móti hesi dálking, sum nú er.

Tó sigur Umhvørvisstovan, tá talan er um grót, ið er sprongt við plast-spreingileidningum, at høvuðsreglan er, at tað er bannað at koyra grót á sjógv, sum er dálkað við plasti ella øðrum dálkandi evnum.

Nýggj norðurlendsk frágreiðing sigur, at til ber at minka útlátið av plasti frá grótspreingingum við í minsta lagi 75 %. Átøkini, sum eru nevnd í frágreiðingini, umfata bæði betri planlegging, so tað slepst undan at nýta plastið, og uppskot til, hvussu plastið kann savnast innaftur. Plastdálkingin stavar frá spreingileidningum og størri plastlutum, men eisini frá mikroplasti, serliga úr armeringsplasti. Her er óivað ein rúgva av hugskotum til, hvussu vit betur fáa vart náttúruna móti plastdálking.

Á Løgtingi, 3. november 2020

Ingilín Didriksen Strøm

[1] World Economic Forum og Ellen Mc Arthur Foundation, https://www.ellenmacarthurfoundation.org/publications/the-new-plastics-economy-rethinking-the-future-of-plastics